# vði krabbamein



*Hundurin Luddi er eitt livandi minni um, at mamman einaferð var sjúk men bleiv frísk aftur. Turið og maðurin keyptu Ludda í Danmark, tá hon var liðug við stráluviðgerðina, og í dag er hann ein náttúrligur partur av lívliga gerandisdegnum hjá Leivi, Guðrun, Lív og foreldrum teirra*

- Teir spurdu meg, hvat feilti, og eg segði, at mamma var sjúk, og at hon hevði krabbamein. Leivur minnist ikki, hvat vinmenninir søgdu, men tað kendist gott, at teir vistu tað. Føðingardagurin var útsettur til dagin eftir, og tí fingu hini vinfólkini tað eisini at vita.

- Vinfólkini hjá honum vóru ótrúliga fitt, greiðir Turið frá.

- Tey komu inn í stovuna og søgdu, at tað var keðiligt, at eg var sjúk, og at foreldrini hjá teimum kundu ikki trúgva, at eg var rakt, minnist Turið.

Eldra dóttirin, Guðrun, sigur, at hon ikki fortaldi tað fyri sínum vinkonum beinanvegin. Tað orkaði hon ikki. Men hon visti, at besta vinkonan visti tað.

- Eg orkaði ikki at snakka um tað ella at hugsa um tað, greiðir Guðrun frá.

- Men eg hugsaði nógv álíkavæl. Eg hugsaði ofta: Hvussu hevur mamma tað nú.

## At liva við krabbameini

Fyri einum árið síðani setti Føroya felag móti krabbameini ein serligan barnabólk á stovn. Børnini hjá Turið vóru bjóðað við, og ein sálarfrøðingur kom heim at práta við tey.

Hetta var aftaná, at viðgerðin hjá mammuni var liðug, og bæði Guðrun og Leivur høvdu hug at muta ímóti, men tey fóru øll, og tað eru tey glað fyri.

Guðrun sigur, at tað hevur verið gott at vera saman við øðrum, sum hava verið ígjøgnum tað sama sum tey. Leivur er samdur.

- Tað hjálpir at tosa um tað, so man ikki goymir upp á sorgina so ræðuliga leingi, sigur hann. Besti vinmaður hansara hevði eisini ein pápa, sum varð sjúkur og doyði av krabbameini um somu tíð, sum mamma hansara var sjúk.

- Vit tosaðu nógv saman, og tað hjálpti mær nógv. Vit vóru í sorg, og hann føldi tað sama, sum eg føldi, sigur Leivur. Tað var eisini hart, at pápin hjá vinmanninum doyði, og Leivur hugsaði nógv um, hvussu tað fór at vera, um mamman doyði.

- Eg hugsaði um, at eg kanska skuldi liva restina av lívinum bara við babba og systrunum. Tað var nóg ringt, tá mamma onkuntíð fór á pedagogskeið í nakrar dagar – og so í eitt heilt lív, sigur Leivur við einum lítlum smíli.

Men mamman vendi aftur til lívið, og hugnaliga stovan við tí góða útsýninum yvir Nólsoyarfjørð er full av hugnaligari, kvinnuligari nærveru. Fitti síðhærdi gravhundurin, Luddi, liggur og snorkar á gólvinum, og 8 ára gamla Lív minnir mammu sína á, at nú má hon koma at koyra seg til fimleik.